# UPPRIT

## viðvíkjandi uppskoti til løgtingslóg um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan

Eg eri boðsendur at koma á fund í løgtingsins uttanlandsnevnd mikudagin 30. november 2005 í sambandi við viðgerðina av omanfyri nevnda máli.

Tá eg meti, at tað kann vera ein fyrimunur fyri umrøðuna í nevndini at kunna nevndarlimirnar um mína meting av málinum, fari eg í hesum stutta uppriti at seta fram nøkur sjónarmið hesum viðvíkjandi.

Viðmerkjast skal, at eg ikki rokni við, at tað er sjálvur sáttmálin, ið skal umrøðast, men heldur ígildisssetingarhátturin sambært uppskoti landsstýrisins.

*Viðurskifti millum altjóða rætt og tjóðarrætt (innlendisrætt)*
Ymiskar lærur hava verið settar fram ígøgnum tíðina um viðurskiftini millum altjóða rætt og tjóðarrætt.

Ført hevur verið fram av summum, at hetta var alt ein samanhangandi (einbýtt) rættarskipan soleiðis at skilja, at tjóðarrættur var undirgivin altjóða rætti, *einbýtislæran.*

Aðrir hava ført fram, at hesar báðar rættarskipanir eru óheftar av hvørjari aðrari, hóast tær gamaní hava samband sínámillum, *tvíbýtislæran.* Talan er sostatt ikki um, at tjóðarrættur á nakran hátt var beinleiðis undirgivin altjóða rætti.

Tað er tó alment viðurkent og eisini staðfest í § 27 í Wien-sáttmálanum um sáttmálagerð, at ein stjórn ikki kann sleppa sær undan at lúka altjóða skyldur við at vísa til, at heimild ikki er í innlendislóggávuni til tess.

Hetta skal skiljast soleiðis, at ein lóg, ið er í stríð við ein altjóða sáttmála, ið viðkomandi land hevur samtykt, ikki av sær sjálvari verður ógildug, men má verða broytt ella avtikin við nýggjari lóg. Hinvegin brýtur viðkomandi land sínar altjóða skyldur, um tað ikki syrgir fyri at skipa innlendisrætt sín samsvarandi tí altjóðarætti, sum tað er bundið av.

Meðan tey skandinavisku londini, Danmark íroknað, halda seg til tvíbýtislæruna, er ein reiðiliga óvanlig grein komin at standa í føroysku stýrisskipanarlógini, ið tykist at seta einbýtislæruna í gildi í Føroyum. Sí nærri um hetta niðanfyri.

*Uppskotið til løgtingslóg um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan (løgtingsmál nr. 15/2005)*
Sambært lógaruppskotinum um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan verður í § 1 skotið upp, at sáttmálin kann verða staðfestur Føroya vegna.

Í § 2 verður skotið upp, at sáttmálin skal hava gildi í Føroyum í øllum yvirtiknum málum, ið sáttmálin fevnir um.

Í § 3 verður skotið upp, at løgmaður fær heimild til at loyva felagsnevndini at broyta sáttmálan Føroya vegna samsvarandi nærri ásettum reglum, og skotið verður somuleiðis upp, at løgmaður kann seta tílíkar sáttmálabroytingar í gildi í Føroyum við kunngerð.

Endiliga verður í § 4 skotið upp, at løgtingslógin fær gildi á gildisdegi sáttmálans.

*Viðmerkingar til lógaruppskotið*
Viðvíkjandi § 1 er lítið at viðmerkja. Hetta er ein vanligur staðfestingarháttur av altjóða sáttmálum.

§ 2 hevur til endamáls at seta sáttmálan í gildi í Føroyum, eftir øllum at døma við sama gildi sum løgtingslógir.

Hetta er ikki vanlig mannagongd, tá tað snýr seg um inkorporering av altjóða sáttmálum í føroyskan tjóðarrætt. Hendan mannagongd má tykjast serliga ivingarsom, tá hugt verður at viðmerkingunum til § 2 í lógaruppskotinum, har m.a. verður sagt, at „við hesum verður ikki neyðugt við fleiri uppskotum til løgtingslóg til tess at útinna sáttmálan, av tí at sáttmálin fær tjóðarrættarligt gildi viðvíkjandi nevndu málsøkjum. Harumframt víðkar greinin seg sjálva, so hvørt fleiri ikki-yvirtikin málsøki verða yvirtikin, ið sáttmálin fevnir um."

Víðari verður sagt í viðmerkingunum, at „sambært hesi grein fær lógaruppskotið sum løgtingslóg sostatt gildi fram um løgtingslógir, ið eru í ósamsvar við Hoyvíkssáttmálan."

Tað sær sostatt út til, at ætlan landsstýrisins ikki er at broyta tær løgtingslógir, ið hildnar verða at vera í stríð við sáttmálan, men at hesar lógir í framtíðini skulu lesast sum broyttar sambært sáttmálanum.

Lógaruppskotið er fyri sovítt í lagi hvat sjálvari inkorpureringini av sáttmálanum viðvíkur, tá ongar reglur eru ásettar í altjóðarætti um, hvussu tílík inkorporering skal fara fram, so hvørt land ger av á hvønn hátt hetta verður gjørt, bert tað verður gjørt soleiðis, at samsvar verður millum altjóða skyldur hjá viðkomandi landi sambært einum sáttmála og innlendis lóggávu.

Trupulleikin kemur at standast av teirri óvissu, ið verður galdandi, tá tað snýr seg um innihaldið av føroyskari lóggávu, ið á einhvønn hátt má haldast at vera í stríð við ásetingarnar í sáttmálanum. Tann tryggasta mannagongdin í somáta er tann, ið vanliga verður nýtt, nevniliga at áðrenn undirskriving ella í sambandi við at ein altjóða sáttmáli verður staðfestur, verður øll lóggáva, ið kann haldast at fara at vera í stríð við sáttmálan, gjøgnumgingin og broytt samsvarandi sáttmálanum.

Hetta má tykjast so mikið skilabetri, tá havt verður í huga, at sambært viðmerkingunum til lógaruppskotið verður Hoyvíkssáttmálin mettur sum mest viðfevnandi sáttmáli, Føroyar nakrantíð hava gjørt við nakað annað land, og at hesin sáttmáli fer at ávirka mong stór lógarøki í føroyska løgdøminum, eins og sagt verður, at Føroyar og Ísland við gildiskomu sáttmálans verða sum eittans búskaparøki at rokna.

Gamaní eru í viðmerking til § 2 roknað nøkur dømi um løgtingslógir, ið eru viðkomandi. Hesar lógir eru so ymiskar sum tryggingarlóg, kappingarlóg, vinnulóg, rúsdrekkalóg og lóg um vatnið í Sumbiarbergholinum.

Tá sáttmálin verður hildin at fevna so víða, er rímiligt at rokna við, at tað eru nógvar aðrar lógir, ið so ella so mugu metast at fara at vera í stríð við ásetingarnar í sáttmálanum.

Havast má eisini í huga, at tað eftir umstøðunum kann vera reiðiliga torført í hvørjum einstøkum føri at staðfesta, um ein lóg er broytt av sáttmálanum ella ikki. Í hesum sambandi verður fyrst neyðugt at samanbera lógina við sáttmálan, sum, eins og vanligt er við tílíkum sáttmálum, er reiðiliga leysliga orðaður í mongum førum. Síðani verður neyðugt at kanna, um viðkomandi lógarøki er yvirtikið ella ikki og sostatt fevnt av sáttmálanum.

At enda kann verða nevnt, at tann mannagongd, ið ætlanin er at nýta sambært lógaruppskotinum, helst ikki er í samsvari við § 52, stk. 3, í stýrisskipanarlógini.

*Viðvíkjandi § 3*
Tað sæst ikki av sjálvum sáttmálanum, hvussu felagsnevndin sambært § 8 í sáttmálanum verður skipað, men helst verður hon paritetisk. Sambært § 8, stk. 2, í sáttmálanum kann felagsnevndin „við samtykki" gera av at broyta §§ 5, 6 og 7 í sáttmálanum umframt frumskjølini til sáttmálan. Orðini „við samtykki" kundu málsliga bent á, at vanlig meirilutasamtykt er nóg mikið, men verður hugt at ensku og donsku orðingini av sáttmálanum, tykist – sum vanligt er – neyðugt við semju í nevndini.

Umframt at nevndin fær heimild til at broyta sáttmálan, uttan at avmarkingar eru settar um, í hvønn mun hetta kann gerast, skal løgmaður eisini hava heimild til við kunngerð at seta tílíkar broytingar í gildi í Føroyum, vælsaktans við sama gildi sum løgtingslógir.

Hetta má metast at vera reiðiliga víðgongt, tá hugsað verður um vanliga heimildabýtið millum løgting og landsstýri.

*§ 55 í stýrisskipanarlógini*
Ein annar spurningur er, um § 2 í lógaruppskotinum ikki er óneyðug, tá innihaldið í § 55 í stýrisskipanarlógini verður havt í huga.

§ 55 er soljóðandi:

> Løgtingslóg, ella partur av løgtingslóg, hevur ikki gildi, um
>
> a) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, heimastýrið hevur gjørt við onnur lond,
> b) hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, Danmark hevur gjørt við onnur lond, og sum eisini fevnir um Føroyar.

Ongar viðmerkingar eru til hesa lógargreinina í stýrisskipanaruppskotinum (løgtingsmál nr. 190/1994) Í bókaútgávuni verður sagt, at „greinin er ein endurtøka av galdandi rættarstøðu sbr. heimastýrislógini § 5..." Í bókaútgávunum verður somuleiðis víst á (s. 79), at avleiðingin av, at ein løgtingslóg møguliga gongur ímóti einum millumtjóðasáttmála, sum er bindandi fyri Føroyar, er tann, at viðkomandi løgtingslóg er ógildug.

Grein í heimastýrislógini ljóðar soleiðis:

> De færøske myndigheders kompetence er undergivet den begrænsning, der følger af de til enhver tid bestående traktatmæssige og andre internationale rettigheder og forpligtelser.

Rigsmyndighederne har afgørelsen i spørgsmål, der angår rigets forhold til udlandet.

Av grundum, ið pláss ikki er til at koma inn á her, er tað mítt sjónarmið, at ein lógarregla, ið ásetir heilt óvanligar reglur fyri viðurskifti millum altjóða rætt og tjóðarrætt, bæði í danska ríkinum og annars um okkara leiðir, er ein yvirtulking av reglunum í § 5 í heimastýrislógini. Hvussu er og ikki, lógin er samtykt av løgtinginum ikki minni enn tvær reisur og er sostatt ein partur av galdandi lóg í Føroyum.

Sum nevnt omanfyri, ásetir § 55 í stýrisskipanarlógini greitt, at ein løgtingslóg ikki hevur gildi, um hon gongur ímóti millumtjóðasáttmála, sum fevnir um Føroyar. Sostatt má haldast, at løgtingið longu við at staðfesta Hoyvíkssáttmálan sambært § 1 í lógaruppskotinum hevur gjørt av, at allar løgtingslógir, ið „ganga ímóti" sáttmálanum, eru ógildugar. Tað skuldi sostatt verið óneyðugt við § 2 og § 3 í lógaruppskotinum.

Tórshavn, tann 28. november 2005

Halgir Winther Poulsen, adv.